# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 44

Apríl 2020



- Ludwig van Beethoven 250 ár
- Filmur í 125 ár
- Talvsiðir í Føroyum
- Messuaklar
- Postgjaldsmerki: í hoyna

Posta
FAROE ISLANDS




Royndarprent




# Ludwig van Beethoven 250 ár

Onkuntíð verður list til, sum livir í sær sjálvari og breiðir seg út um alheim og æviskeið listafólksins. Hettar er serliga galdandi í tónleikaheiminum og, serliga, millum verkini hjá stóru klassisku tónaskøldunum.

Klassisku tónaverkini eru skrivaði til orkestur av ymsari støðd og ætlað konsertframførslu við áhoyrarum. Hettar førir til áhaldandi nýtulkingar av verkunum, treytaðar av hugflogi og sinnalag hjá dirigentunum og dygdina av orkestrunum.

Harafturat kemur so førleikin og evnini hjá áhoyraranum at taka støðu til verkini – vit eru øll børn av okkara mentanararvi. Antin tað stendst av muni í sjálvum samfelagnum, ella mentanarliga treytaðar munir millum landamørk, so verða verkini altíð uppfata við ymsum fortreytum.

Og tað tykist vera tankin í myndlýsingini hjá fjøllistamanninum, Heiðriki á Heygum, av Ludwig van Beethoven, nú tónaskaldið fyllur 250 ár. Heiðrikur hevur lati mæta tónasmiðin í føroysk klæði, stilla hann í ikonisk føroysk landsløg – umgyrdan av líka so ikoniskum dømum úr føroyska djóra- og plantuheiminum.

Týski Beethoven, sum búði ta mesta av lívinum í Wien í Eysturríki – og kanska ikki var greiður yvir at Føroyar vóru til – er ein líka so natúrligur partur av føroyskari mentan sum landslagið, vindurin og veðrurin í fjøllunum. Hansara tónleikur hevur fylgt okkum gjøgnum lívið, birt hugmyndir og ávirka okkum á jøvnum fóti við okkara egnu sermentanarligu sameyðkenni – og tað sigur seg sjálvt, at vit heiðra gamla meistaran sum ein av okkara egnu.



*Bringumynd av Ludwig van Beethoven uttanfyri Beethoven-Haus í Bonn. Myndahøggari: Cantemir Riscutia (1926-2001)*

**Ludwig van Beethoven (1770 – 1827)**

Ludwig van Beethoven varð føddur í býnum Bonn í táverandi kurfúrstadøminum Køln, í Týsk-rómverska keisararíkinum. Hann vísti seg longu sum barn at hava óvanligar tónlistagávur og fekk tí frálæru í tónleiki frá pápanum, Johann van Beethoven og hovorganistinum Christian Gottlob Neefe, sum eisini stuðlaði honum við hansara fyrstu trilvandi royndum sum tónaskald.

22 ára gamal flutti Beethoven til Wien at lesa tónleik hjá Joseph Haydn. Hann gjørdist brátt kendur í háborgini fyri klassiska tónleikin, sum ein óvanliga gávaður klaversnillingur. Kendur í teimum fínaru salongunum fyri sínar improvisatiónir og variatiónir yvir verk hjá øðrum tónaskøldum – samstundis sum hann sjálvur royndi seg sum tónasmiður. Í 1795 hevði Beethoven sína fyrstu almennu konsert í Wien og útgav stutt eftir sítt fyrsta verk.

Beethoven var sera hugtikin av verkunum hjá W. A. Mozart, sála, og granskaði tey gjølla. Hansara fyrstu tónaverk vóru merkt av tónleikinum hjá Haydn og Mozart, men eftirhondini sum hann búnaðist tónlistarliga, mentist hansara egni sermerkti stílur. Tað varð til eitt umfatandi lívsverk, har kendastu partarnir eru tær 9 symfoniurnar, 32 klaversonatur, 5 klaverkonsertir og 16 strúkikvartettir. Harumframt komponeraði hann kamartónleik, kórverk og sangir.

Í 1796, tá Beethoven var 26 ára gamal, fór hoyrnin at bila, orsaka av herviligum tinnitus. Støðan versnaði tey fylgjandi árini og tað gjørdist eftirhondini torført hjá honum at spæla til konsertir. Men sjúkan forðaði honum ikki í at skriva tónleik – og seinastu



*Málningur av Ludwig van Beethoven. Listamaður: Josef Karl Stieler (1781-1858)*

10 árini av lívinum, tá hann meir ella minni var stokkdeyvur, skapti hann nøkur av sínum best umtóktu verkum. Eftir langa sjúkralegu, andaðist Beethoven í 1827, 56 ára gamal. Hann telist sum ein av størstu klassisku tónaskøldunum, javngóður við fyrimyndina, Mozart.

Hansara árin á mentanarlívið í samtíðini var ómetaligt – og hann stendur sum ein undangongumaður í skiftinum millum klassiska og romantiska tónleikin. Ávirkaður av frælsishugsjónunum í upplýsingartíðini, legði hann ein kórsats í sína 9. symfoni, sum bygdi á yrkingina "An die Freude" hjá Friedrich Schiller – ein vakur fagnaður av mannaættini – og eitt lag ið hvørt mansbarn í dag kennir aftur sum evropiska tjóðlagið.

Jú, Beethoven er so avgjørt føroyingur - líka so væl sum hann er alheimsins tjóðir – og hevur sanniliga uppiborið okkara eyðmjúku kvøðu á sínum 250. føðingardegi.

*Anker Eli Petersen*



*Undirskriftin hjá Beethoven*







Royndarprent




# Filmur í 125 ár

Í ár eru 125 ár liðin síðan fyrsti spælifilmur varð sýndur. Hetta var tann 28. desember 1895, tá brøðurnir Louis og Auguste Lumière høvdu teirra fyrstu almennu filmssýning í París. 33 áskoðarar vóru til staðar. Tað er í hesum sambandi at Posta hevur valt at geva út frímerki har evnið er spælifilmur. Katrin Ottarsdóttir (f. 22. mai 1957) er føroyskur leikstjóri, leikrithøvundur, og rithøvundur. Í 1989 kom fyrsti spælifilmur hennara, sum eisini var fyrsti spælifilmur, sum varð gjørdur av føroyskum leikstjóra, gjørdur í Føroyum og har tosað varð føroyskt.

**Katrin Ottarsdóttir:**
Tá eg fór til Danmarkar eftir at hava tikið studentsprógv, visti eg onki um nakran filmskúla. Men so skjótt eg frætti, at ein sovorðin var til, visti eg, at tað var tað, eg skuldi. Tankin um at fólk fóru at sita í myrkrinum í einum biografi og hyggja og lurta eftir tí, ið eg hevði at siga, var tølandi. Mær hevur altíð dámt væl at skriva. Men eg havi aldrin dugað serliga væl við tí talaða orðinum, og nú kundi eg fáa filmarnar at tosa fyri meg.

Skjótt fann eg út av, at eg hevði valt ein tann truplasta vegin í lívinum fyri ein føroying - eina føroyska kvinnu. Men eg var treisk og vildi prógva, at eg kundi fáa filmar upp at standa, hóast ongin heima í Føroyum trúði upp á hesa 23 ára gomlu kvinnuna, sum vildi hava pengar at gera filmar fyri. Filmur var nakað tey gjørdu í útlondum.

Ein bankastjóri, sum eg loyvdi mær at senda eina umbøn til um stuðul til ein lítlan film, skal hava ringt runt og spurt seg fyri um hesa løgnu og sera órealistisku ungu kvinnuna. Pengar fekk eg sjálvandi ongar. Eg lænti eitt sindur av pengum frá eini

ommu míni, so tann lítli filmurin kortini kundi gerast veruleiki.

Tá eg hugsi um teir filmarnar, sum eg brendi eftir at gera, men aldrin fann pengar til, so vildi eg ynskt, at eg ikki var pionerur. Ynskt, at eg búði í einum landi, har tað var vanligt at gera film. Í Føroyum var ongin at styðja seg til tá. Tað er mítt treiskni, sum hevur verið drívmegin øll hesi árini. Umframt stuðulin frá og samstarvið við mannin í mínum lívi.

Hóast alt hetta, so eru nakrir filmar komnir burtur úr - against all odds. Mín fyrsti spælifilmur bar til, tí at ein norðurlendsk filmsstevna skuldi vera í Føroyum, og eg helt tað vera ov galið, um ongin føroyskur filmur var við, tá Føroyar nú høvdu meg, ein filmsleikstjóra við loknari útbúgving frá einum av mest viðurkendu filmskúlunum í Europa, The National Film School of Denmark. Til alla lukku vóru fleiri mentafólk og politikarar samdir, og filmurin "Atlantic Rhapsody", 1989, kundi gerast veruleiki sum ein reint føroyskur low-budget-filmur. Atlantic Rhapsody hevur ferðast um heim og vann heiðursprísin á Norðurlendsku Filmsstevnuni í Lübeck tað árið.

Tað mesta av tíðini hevur tað verið sum harður róður í streymasjógvi. Og enn havi eg ikki gjørt mínar mest týðandi filmar. Ofta hevur tilvildin spælt við, hvørjar filmar eg fekk møguleikan at gera. Men um eg skal orka at gera fleiri - fyri meg - átroðkandi filmar, mugu umstøðurnar vera betri. Eg eri komin til ta niðurstøðu, at eg ikki orki at rógva so hart longur. Mín seinasti spælifilmur, "LUDO", 2014, sum eg vildi gera so persónligan sum gjørligt, og sum vit gjørdu fyri næstan ongar pengar, tók alla mína orku og sendi meg næstan út av eggini. Men filmurin fór út í verðina har hann m.a. vann prísir í Europa og USA.

Spælifilmurin, "Bye Bye Blue Bird", 1999, hevur eisini ferðast um alla verðina og vunnið virðislønir. T.d Tiger Award á altjóða filmsstevnu í Rotterdam. Umframt at hann fekk eitt lív í biografum í m.a. Týsklandi, Hollandi og Japan. Stutti spælifilmurin, "Maðurin ið slapp at fara", 1995, luttók eisini á fleiri filmsstevnum í Europa. At gera film er ikki eitt starv sum tú fert til og frá. Tað er ein lívsháttur sum fer í blóðið. Tað er at vera fyribúgvin alla somlu tíðina. Og ber ikki til at veruleikagera filmsdreymarnir, dettur tú antin veruliga út av eggini ella tú verður enn treiskari.

Aftrat spælifilmunum havi eg gjørt dokumentarfilmar um Regin Dahl, skald, Hans Paula Olsen, myndahøggara, Tórodd Poulsen, fjøllistamann, og Jóanes Nielsen, rithøvund, umframt ein barnafilm, eina filminstallasjón, nøkur videoløg og fleiri sjónvarpssendingar.

**Bye Bye Blue Bird, 1999**
*Ein road-movie um tær báðar ungu vinkonurnar, Rannvá og Barbu, sum venda aftur til Føroya eftir fleiri ár í útlondum. Har er bæði litføgur provokatión og uppgerð við fortíðina í filminum.*

**LUDO, 2014**
*LUDO er eitt psykologiskt drama um eina 11-ára gamla gentu, sum er fangað millum óstøðuga sinnið hjá mammuni og vælmeinandi atgerðarloysið hjá pápanum.*




*Filmplakat Bye Bye Blue Bird. Mynd: Blue Bird Film*







Royndarprent




# Talvsiðir í Føroyum

Sum tíðin er farin, hevur talv ment seg og ymiskir eru siðirnir í teim mongum mentanum. Í 15. øld fann hetta vælumtókta borðspæl sítt núverandi skap, men í mongum londum hevur tað harumframt fingið ymisk frábrigdi.

Eisini í Føroyum fekk talv sínar egnu talvsiðir og hendan frímerkjaútgávan lýsir tveir av hesum.

**Fýrtalv**
Tá spælt verður fýrtalv er vanliga talvborið við 64 puntum víðkað við trimum eyka røðum í hvørjari av teimum fýra síðunum – so samanlagt eru 160 puntar. Tey 16 talvfólkini hjá hvørjum leikara verða sum vanligt sett á tær báðar uttastu røðirnar og luttakararnir skiftast um at flyta. Fýra leikarar, tveir í hvørjum parti, sita yvir av hvørjum øðrum og tað er teimum ikki loyvt at geva hvørjum øðrum ráð viðvíkjandi spælinum.

Annars eru reglurnar nærum tær somu sum í vanligum talvi. Um ein leikari verður settur í mát, so kann tann, sum er í parti við honum, hjálpa honum leysan. Eydnast tað ikki og tann, sum er í parti við honum, eisini verður settur í mát, so hava teir tapt.

Fýrtalv varð vanliga spælt uttan at tíð varð tikin, og tí kundi hvørt talv gerast sera langt og fløkjasligt.

Søgur siga frá, at talv vórðu sett til viks um várið og uppafturtikin um heystið, tá menn komu aftur av fiskiskapi.

Í summum bygdum var vanligt at telva fýrtalv og fólk komu saman at hyggja at. Var talvið spennandi, so kundi tað ganga hart fyri seg, tá tey sum hugdu at, ikki kundu bara sær við at koma við viðmerkingum til telvingina á talvborðinum. Í Føroyum í dag eru bert nøkur fá fólk, sum savnast at telva fýrtalv.



*Fýrtalv. Tjóðsavnið. Mynd: Ole Wich*

Frímerkið vísir talvborðið, ið varð brúkt at telva fýrtalv á umframt fýra heimagjørd talvfólk. Ein riddara, ein kong, eina frúgv og ein bisp.

**Talvfólkið "Rókur"**

Rókarnir, ið standa í hornunum á talvborðinum eru virkin og sterk talvfólk. Teir kunnu flyta seg skjótt og langt í einum leiki. Mong eru ástøðini um hví hetta talvfólkið nevnist rókur á føroyskum. Í India nevnist hetta talvfólkið "ratha" og á persiskum "rukh", og í báðum førum er hetta heitið á einum hestadrignum tvíhjólaðum stríðsvagni, ið ofta varð styrktur við einari grótlíknandi brynju.

Tá spælið kemur til Italia fær hetta talvfólkið heitið "rocca", sum merkir torn. Kanska er tað ávirkað av hjóldrigna álopstorninum, nevnt "torre," ið varð brúkt, tá víðgyrdir múrar skuldu hertakast. Tulkingin av talvfólkinum sum ein bygningslutur, eitt torn, fer eisini yvir í onnur evropisk mál, t.d. franskt "tour" og týskt "turm". So við og við broytist útsjóndin til at líkjast einum torni. Tornsúmbolini verða eisini brúkt á vápnaskjøldrum, og her í skjaldramerkjafrøðini er líkheitin helst meira ávirkað av hestahøvdum, ið stinga upp um stríðsvagnin.

Á enskum varð talvfólkið onkuntíð nevnt "castle", men í dag nevnist tað "rook", eitt orð av ivasomum uppruna. Hetta er eisini navnið á einum fugli (*corvus frugelia*). Tað sær sostatt út til at hetta heitið hevur ávirkað føroyska heitið av talvfólkinum rókur. Krákufuglurin (*corvus monedula*) nevnist rókur á føroyskum.

Fleiri av føroysku talvfólkunum vórðu heimagjørd, telgd í træ og ofta avmyndaðu tey fólk, eisini rókarnir. Men okkurt kundi bent á at orðið rókur, samheitið fyri krákufuglin (*corvus monedula*) , hevur ávirkað útsjóndina á talvfólkinum í horninum á talvborðinum. Í fleiri eldri útgávum av hesum talvfólki hevur



*Andlitsmynd av talvfólkinum "rókur". Tjóðsavnið. Foto: Ole Wich*

listafólkið telgt ein mann við einum fugli á høvdinum. Heitið og útsjóndin hevur flutt seg frá stríðsvagni umvegis ein bygning til ein fuglahatt. Soleiðis flyta mentanarmynstur seg á órannsakandi leiðum.

Frímerkið vísir ein heimagjørdan rók, sum er umgyrdur av teimum mentanarlutum, sum útsjóndin er runnin av: talvborðið, stríðsvagnurin, álopstornið, tornið, sum er avmyndað í skjaldramerkinum og ein vanligan rók.

Tey talvfólkini, sum eru avmyndað á frímerkinum eru á Tjóðsavni Føroya. (snr 4484.)

*Ole Wich*



*Svørt frúgv hóttir kong. Mynd: Ole Wich*







Royndarprent




# Messuaklar II

**Messuaklar II – Viólbláur og hvítur**

Í fjør gav Posta út tey fyrstu tvey frímerkini í røðini um føroyskar messuaklar – tann reyða og tann grøna. Ársins útgáva avmyndar viólbláa messuakulin – litkenning fyri advent og føstu – og hvíta messuakulin, ið serstakliga verður nýttur á jólum, á páskum og til hátíðarlig tiltøk.

**Viólblái messuakulin**

Viólblái messuakulin í ársins røð er úr Viðareiðis kirkju. Kirkjan fekk hann í 2017, tá ið hon fylti 125 ár – og í sambandi við 500 áradagin fyri trúbótina. Paulina M. K. Eliasen seymaði hann.

Viólblái messuakulin er gjørdur úr ullintum tilfari og myndprýddur við Lutherrósuni framman og aftan, handseymaður við krossstingi og gobelinseyming.

**Lutherrósan**

Lutherrósan er ein vanlig ímynd fyri protestantisku kirkjuna. Rósan var persónliga innsiglið hjá Martini Luther og kemur fyrstu ferð fyri á einum brævi frá 1517. Eftir hvat ið skilst teknaði Luther sjálvur rósuna. Svarti krossurin í reyða hjartanum ímyndar treytaleysu trúnna á tann krossfesta Krist og kærleikan í boðskapinum.

Hvíta rósan ímyndar gleðina, troystina og friðin í trúnni. Bláa bakgrundin er ein sinnismynd av andaligu og trúarligu vónini um himmalska gleði, sum, sambært Luther, byrjar longu her á foldum.

Gylti ringurin, ið kransar bláa litin, boðar, at himmalska gleðin varir í allar ævir og er dýrbærari enn aðrar gleðir og aðrir ágóðar.



*Viðareiðis kirkja. Mynd: Faroephoto*

**Hvíti messukulin**

Hvíti messuakulin hoyrir heima í Kvívíkar kirkju. Hann er bundin og myndprýddur við krossi og borda við ymsum kristnum ímyndum. Kirkjan fekk vakra messuakulin í 1989, og tað er Johanna Jensen í Nýggjustovu, ið hevur gjørt hann.

**Krossur og ímyndir**

Sum nevnt er messuakulin myndprýddur við einum stórum krossi og borda í neðra. Bæði krossur og bordi eru eisini prýddir við ymsum ímyndum, tiknar frá útskornu rimunum í kirkjukórinum – sum annars stava frá eldri kirkjuni á staðnum, sum var tikin niður í 1903, tá ið núverandi kirkja varð bygd.

Tað er eitt sindur ógreitt, hvat ið flestu frámerkini ímynda, men altarskalkurin, krossar og smærubløð, sum ímynda tríeindina, kennast aftur. Hvítt er annars elsti liturgiski liturin og ímyndar gleði, hátíð og føðing.

*Anker Eli Petersen*



# Liturgisku litirnir í kirkjuárinum




*Kirkjuárið avmyndað sum eitt hjól. Design: Anker Eli Petersen*













Royndarprent




# Postgjaldsmerki: í hoyna

Nú hoygging upp á gamla mátan mangar staðir er farin í søguna, eru tað tó mong, sum minnast slóttumann standa á grønum vølli sveipandi við líggja, har titandi smáfuglar pikka småverur úr bera nýslidna vøllinum. Og tær nývaknaðu hoyggingargenturnar breiddu døggvátu líggjaskógvarnar um teig til turkingar, meðan tær droymdu um kærleika og kæti. Soleiðis kundi ein terradagur ganga, til avsett var.

Og so var tað turkilagið, har bæði maður og kona fingu toyggið, tá ið nýavsetta grasið bæði skuldi dragast til og heingjast skynsamt uppí. Men turkilagið átti eisini mangan vin, tí, var grasið fyrst komið upp at hanga, var sloppið; og hvør hevur ikki sæð kvikgongdar menn við byrðu á baki lovprísa hesum vælsignaða uppfinnilsi, meðan teir bóru burtur úr turkilagnum.

Har turkað varð á hógvi var kæti, har bæði ung og gomul hugnaðu sær við rívu í hond í hoyna, meðan søgur vórðu sagdar og pjátrað varð við smábørn, sum her - bæði í spæli og virksemi - fingu sín fyrsta lærdóm um ein alheim, sum bæði føddi og gøddi.

Hvør hevur ikki sæð og hoyrt kyllingarkonuna smádeilast við sátubarn sítt, meðan hon hampaði støðið og fekk kollin at sita, áðrenn hon legði bendil á.

*Petur Martin Petersen*



*Í hoyna. Foto: Faroephoto, 2014*

AVLÝST!

# LONDON 2020

Sum tey flestu helst longu vita, so varð frímerkjaframsýningin London 2020, avlýst orsakað av Covid-19 farsóttini. Ætlanin er tó at framsýningin verður í 2022.

Ætlaða útgávan av postgjaldsmerkjunum við evnunum "Gomul postkort" verður tískil útsett.



# Nýggjar útgávur tann 21. september og 1. oktober 2020



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Ludwig van Beethoven 250 ár** |
| Útgávudagur: | 21.09.2020 |
| Virði: | 44,00 kr. |
| Nummar: | FO 935 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Stødd, smáark: | 80 x 60 mm |
| Listafólk: | Heiðrik á Heygum |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv til útheimin 101-250 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Filmur í 125 ár** |
| Útgávudagur: | 21.09.2020 |
| Virði: | 12,00 og 26,00 kr. |
| Nummar: | FO 936-937 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 26 mm |
| Sniðgeving: | Blue Bird Film |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja 0-50 gr og stórbrøv til útheimin 0-100 gr. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Talvsiðir í Føroyum** |
| Útgávudagur: | 21.09.2020 |
| Virði: | 17,00 og 27,00 kr. |
| Nummar: | FO 938-939 |
| Stødd, frímerki: | |
| Listafólk: | Ole Wich |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv innanoyggja 0-100 og 101-250 gr . |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Messuaklar II** |
| Útgávudagur: | 21.09.2020 |
| Virði: | 12,00 og 20,00 kr. |
| Nummar: | FO 940-941 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm og 40 x 30 mm |
| Listafólk | Paulina M.K. Eliasen og Jóhanna Jensen |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja og til útheimin 0-50 gr. + sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2020: í Hoyna** |
| Útgávudagur: | 01.10.2020 |
| Virði: | 4 x 12,00 kr. |
| Stødd, frímerki: | 55,0 x 22,5 mm |
| Listafólk: | Suffía Nón |
| Prentingarháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Limo Labels, Danmark |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, 0-50 gr. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Kvívík. Myndatøka: Faroephoto . Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps

# Vignettes d’affranchissement

Au fil du temps, nos belles vignettes d’affranchissement sont devenues des objets de collection intéressants et recherchés. Posta, le service postal des Îles Féroé, émet des vignettes d’affranchissement depuis 2008. Nous allons maintenant vous raconter leur histoire : les valeurs faciales, les surcharges et les machines qui les fabriquent.

**Pour imprimer des vignettes, nous utilisons deux modèles de machines du fabricant aCon : la « Frankie » et la « IAR-F001 »**

Notre « Frankie » existe depuis 2008. Tous les ans, en octobre, nous y imprimons des vignettes d’affranchissement que nous adressons à nos abonnés. La machine « IAR-F001 » a été utilisée pour la première fois pour le salon philatélique Nordia en 2017. C’est elle qui travaille dur pour fabriquer des vignettes avec surcharge lors des salons. C’est pour cela qu’elle est utilisée lors des salons et des expositions philatéliques – et à d’autres occasions particulières. Visitez notre boutique à www.stamps.fo pour différentes variétés de vign. d’affranchissement.

**Vign. d’affranchissement de "frankie":**



**Vign. d’affranchissement de IAR-F001:**



Grâce à nos vignettes d’affranchissement, nous proposons également un nombre de produits annexes, entre autre des enveloppes Premier Jour (FDC) et des pochettes de collection.







**Posta Stamps participe aux expositions suivantes :**

*Participation avec oblitération spéciale :*

**Philex 2020,** 11-14 juin 2020, Paris, France*
**Nordia 2020** 4-6 septembre 2020, Malmö, Suède

*Participation sans oblitération spéciale :*

**Sindelfingen 2020,** 22-24 octobre 2020, Sindelfingen, Allemagne

Posta FAROE ISLANDS

**NB! Ceci est susceptible de changer ou annulation!*

# Bulletin de commande - Posta Stamps no. 44

| No. | Article | | Prix DKK | Prix Euro | Qte. | Total |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Émission 21.09.2020 - Ludwig van Beethoven 250 ans - FO 935 (bloc-feuillet avec 1 timbre)** | | | | | | |
| PPS000920 | Ludwig van Beethoven, bloc neuf | * | 44,00 | 6,15 | | |
| FFT000920 | Ludwig van Beethoven, bloc obl. | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| DDT000920 | Ludwig van Beethoven, bloc obl. jour | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| FFU000920 | Enveloppe premier jour /bloc | ☉ | 49,00 | 6,85 | | |
| **Émission 21.09.2020 - 125 ans de longs métrages - FO 936-937 (2 timbres)** | | | | | | |
| PPA010920 | 125 ans de longs métrages, série neuf | * | 38,00 | 5,30 | | |
| FFG010920 | 125 ans de longs métrages, série obl. | ☉ | 38,00 | 5,30 | | |
| DDG010920 | 125 ans de longs métrages, obl. jour | ☉ | 38,00 | 5,30 | | |
| FFK010920 | Enveloppe premier jour /série | ☉ | 43,00 | 6,00 | | |
| FFL010920 | Enveloppe premier jour /timbres sing. | ☉ | 45,00 | 6,30 | | |
| FFM010920 | Enveloppe premier jour /bloc de 4 | ☉ | 159,00 | 22,25 | | |
| PPB010920 | Série de blocs de 4 marginaux, sup. | * | 152,00 | 21,25 | | |
| PPC010920 | Série de blocs de 4 marginaux, inf. | * | 152,00 | 21,25 | | |
| PPD000936 | 125 ans longs métrages feuille 17KR (20) | * | 240,00 | 33,60 | | |
| PPD000937 | 125 ans longs métrages feuille 27KR (20) | * | 520,00 | 72,80 | | |
| **Émission 21.09.2020 - La tradition féroïenne des échecs - FO 938-939 (2 timbres)** | | | | | | |
| PPA020920 | Échecs, série neuf | * | 44,00 | 6,15 | | |
| FFG020920 | Échecs, série obl. | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| DDG020920 | Échecs, série obl. jour | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| FFK020920 | Enveloppe premier jour /série | ☉ | 49,00 | 6,80 | | |
| FFL020920 | Enveloppe premier jour /timbres sing. | ☉ | 51,00 | 7,15 | | |
| FFM020920 | Enveloppe premier jour /bloc de 4 | ☉ | 183,00 | 25,50 | | |
| PPB020920 | Série de blocs de 4 marginaux, sup. | * | 176,00 | 24,50 | | |
| PPC020920 | Série de blocs de 4 marginaux, inf. | * | 176,00 | 24,50 | | |
| PPD000938 | Échecs, feuille 20KR (20) | * | 340,00 | 47,50 | | |
| PPD000939 | Échecs, feuille 35KR (20) | * | 540,00 | 75,50 | | |
| **Émission 21.09.2020 - Chasubles II - FO 940-941 (2 timbres)** | | | | | | |
| PPA030920 | Chasubles II, série neuf | * | 32,00 | 4,45 | | |
| FFG030920 | Chasubles II, série obl. | ☉ | 32,00 | 4,45 | | |
| DDG030920 | Chasubles II, série obl. jour | ☉ | 32,00 | 4,45 | | |
| PPN000920 | Chasubles II, carnet neuf | * | 96,00 | 13,45 | | |
| FFO000920 | Chasubles II, carnet obl. | ☉ | 96,00 | 13,45 | | |

* = neuf ☉= oblitéré

| No. | Article | | Prix DKK | Prix Euro | Qte. | Total |
|---|---|---|---|---|---|---|
| DDO000920 | Chasubles II, carnet obl. jour | ☉ | 96,00 | 13,45 | | |
| FFP000920 | Enveloppe premier jour avec carnet | ☉ | 101,00 | 14,15 | | |
| FFK030920 | Enveloppe premier jour /série | ☉ | 37,00 | 5,15 | | |
| FFL030920 | Enveloppe premier jour /timbres sing. | ☉ | 39,00 | 5,45 | | |
| FFM030920 | Enveloppe premier jour /bloc de 4 | ☉ | 135,00 | 18,90 | | |
| PPJ000920 | Carte postale (1) | * | 14,00 | 1,95 | | |
| FFJ000920 | Carte maximum (1) | ☉ | 46,00 | 6,45 | | |
| PPB030920 | Série de blocs de 4 marginaux, sup. | * | 128,00 | 17,90 | | |
| PPC030920 | Série de blocs de 4 marginaux, inf. | * | 128,00 | 17,90 | | |
| PPD000940 | Sepac 2020, feuille (20) | * | 240,00 | 33,50 | | |
| PPD000941 | Chasubles II, feuille (20) | | 400,00 | 56,00 | | |

**Émission 01.10.2020 Vignettes d'affranchissement 2020 (4)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| PMA002020 | Vign. d'affranchissement, série neuf | * | 48,00 | 6,70 | | |
| FMG002020 | Vign. d'affranchissement, série obl. | ☉ | 48,00 | 6,70 | | |
| DMG002020 | Vign. d'affranchissement, obl. jour | ☉ | 48,00 | 6,70 | | |
| FMK002020 | Enveloppe premier jour /série | * | 53,00 | 7,40 | | |
| FML002020 | Enveloppe premier jour /sing. | ☉ | 59,00 | 8,25 | | |

**Divers**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| WPMAMAP01 | Sepac 2020, affiche | * | 134,00 | 18,75 | | |
| WPMAMAP02 | Pages pour Album Luxe 2019 | * | 178,00 | 24,90 | | |
| PMA002019 | Pages pour Noël 2019 | * | 44,00 | 6,15 | | |
| FMK002019 | Album Luxe III avec pages 2015-19 | ☉ | 49,00 | 6,85 | | |
| | | | | | | |
| | | ***Administratifs :*** | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prix au total** | | |

Veuillez bien remplir le coupon au dos →

## Oui, svp! Je souhaite m'abonner aux produits suivants :

| Quant. | | | Produit |
|---|---|---|---|
| | PPA | * | série/s de timbres neufs |
| | PPS | * | série/s de bloc miniature neufs |
| | PPN | * | carnets de timbres |
| | PPY | * | jeu annuel |
| | PPZ | * | livre annuel |
| | FFK | ☉ | enveloppe/s premier jour avec série de timbres |
| | FFU | ☉ | enveloppe/s premier jour avec de bloc miniature |
| | PMA | * | série/s de timbres de distributeur neufs |
| | FMK | ☉ | enveloppe/s premier jour avec série de vignettes d'affranchissement |
| | JOJ | * | Cartes de Noël |

**Modes de paiement**

☐ À notre compte CCP à Paris no. 243.69 U 020
IBAN : FR23 2004 1000 0100 2436 9U02 025, SWIFT- BIC: PSSTFRPPAR

☐ À notre compte CCP à Copenhague :
IBAN : DK02 3000 0006 2598 47, SWIFT-BIC : DABADKKK.
Danske Bank, Frederiksberggade 1, DK-1459 Copenhague K, Danemark

☐ Dans l'avenir je souhaite que tous les commandes et envois d'abonnement soient payés automatiquement de mon carte crédit ci-dessous :

**Je paye avec carte de crédit :**

No. de carte : ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐

Expiration : ☐☐☐☐

Montant : ____________________ Signature : ________________________________________

**Veuillez bien noter que les banques féroïennes n'acceptent plus des chèques bancaires. Par conséquent, nous ne pouvons plus accepter les chèques comme moyen de paiement de nos clients.**

- TVA : Veuillez bien noter que toutes les commandes pour la France sont majorées de 5,5 % de TVA
- Veuillez bien toujours indiquer votre numéro de client chez Posta Stamps

**Posta** Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Iles Féroé

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Nom : ____________________

Adresse : ____________________

Code postal/Ville : ____________________

Pays : ____________________

Email: ____________________

No. de client : ☐☐☐☐☐☐☐

PS2020